Føroyar-Kypros 0-3 (0-1):

# Nakað lort



**Móti 10 kypriotum í 53 minuttir megnaði landsliðið í alt ov lítlan mun at dominera dystin. Og tó at vit hóast alt spældu okkum til málmøguleikar, so vórðu hesir skammiliga misnýttir, tá føroyska liðið fekk tað á pappírinum lakasta úrslitið í langa tíð**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Keðiligt. Syndarligt. Irriterandi. Troyttandi. Leiðiligt. Býttisligt. Óneyðugt.

Jú. Lýsingarorðini trutu ikki, tá yvirskriftin til greinina skuldi finnast. At tað so gjørdist tann oman fyri standandi var tó kanska meira sjálvsagt, tá alt kom til stykkis. Tí tað var nakað lort, at føroyska fótbóltslandsliðið skuldi tapa fyri Kypros. Og tó at eitt tap altíð vil vera eitt tap, so var tað ikki minni lort, at úrslitið skuldi gerast somikið greitt sum 0-3.

### Vónirnar til Toda

Tí sjáldan hava fortreytirnar fyri einum góðum úrsliti verið betri. Longu meðan tað vóru 11 móti 11 vóru okkara væl og virðiliga við til at mynda dystin. Og tá gestirnir so stutt fyri hálvleik mistu ein spælara, áttu okkara at sett seg á dystin. At kypriotiski venjarin seinni varð burturvístur av vøllinum, betraði ikki um fortreytirnar hjá gestunum, sum altso kortini skoraðu tvær ferðir móti dystarenda.

Tað byrjaði annars so væl. Vónirnar til føroyska liðið vóru stórar, nú vit loksins áttu heimadyst móti einum av teimum tjóðunum, sum vit vanliga sammeta okkum við. At talan so samstundis var um dystin, har Todi Jónsson loksins aftur var at síggja í landsliðsbúnanum, gjørdi ikki vónirnar minni.

Og Todi gav eisini góð lyfti um, at hann kundi levera vøruna. Gaman í áttu gestirnir fyrsta møguleikan, tá Jens Martin kom væl út móti mest sum púra leysum mótstøðumanni, men tað var skjótt, at Føroyar svaraðu aftur.

Todi streyk ígjøgnum høgra verjuborð hjá Kypros, og ivaleyst átti Jákup at hagreitt innleggið betri, men í royndunum at flyta bóltin á høgra beinið, hvarv stóri møguleikin. Stutt eftir átti Todi sjálvur at havt skorað, tá hann átti seinasta fótin á einum trídupultum møguleika, sum íkom eftir uppspæl í høgru. Men tann royndin fór omanfyri.

Og aftur løtu seinni kundi møguleiki spurst burturúr, men ta ferðina valdi Todi at royna eydnuna sjálvur, heldur enn at prika til Jákup, sum stóð púra blankur, tá øll kypriotiska verjan hugsaði um mannin við 10-talinum á bakinum.

### Taktiskt mistak

Og tó at tað eftir hetta gekk ein løta, áðrenn okkara veruliga komu til nakran møguleika, so var talan um ein sera lívligan dyst. Ikki minst tí báðir venjararnir høvdu valt at skumpa annan av sentralu miðvallarunum langt upp á vøllin. Tað gav samstundis rúm fyri nógvum kontra-renningum hjá báðum pørtum, og sum áskoðari sat tú við varhuganum av, at tað liðið, sum fekk fyrsta málið, eisini fór avstað við sigrinum.

Tað var tó ein dyggur smeitur hjá føroyska liðnum, tá Súni Olsen longu eftir lítlum korteri mátti taka seg av vøllinum. Ikki bara mistu Føroyar við hesum besta vinstra bakkin í landinum, men fyri føroyska uppspælið kostaði hetta nógv. Róliga bóltmedferðin og neyvu sendingarnar vóru ikki longur partur av føroyska uppspælinum, og tað merkti, at umstillingin millum verju og álop als ikki gekk eins skjótt, sum hon kundi gjørt.

Tá tað er sagt, so skal samstundis verða givið eitt stórt heraklapp til Mortan úr Hørg, sum veruliga tók kjansin, nú hesin kom so brádliga. Fyrstu løtuna hevði hann kanska trupulleikar at lofta nógv reikandi Ioannis Okkas, tá hesin leitaði djúpt og út í borðini, men so líðandi kom sumbingurin alt betri við í spælið. Ikki minst, tá hann støðugt bjóðaði seg fram í uppspælinum.

Ein spurningur, sum skjótt meldaði seg í hesum sambandi var, um tað ikki vildi verið rættari, um Mortan var millum teir fyrstu ellivu. Í øllum førum sannførdi Johan Byrial Hansen ikki serliga nógv á bakkinum. Ivaleyst grundaðu venjararnir álitið á hann við góða avrikinum í seinasta landsdystinum. Men Søren Lerby segði einaferð so beinrakið, at tú ert ikki betri enn tín seinasti dystur, og hjá Byrial er seinasti dystur nú nakað síðani.

### Katastrofalt mál

Fimm minuttir fyri steðgin hendi so tað, sum barasta ikki mátti henda, tá gestirnir brádliga fingu lagt seg á odda. Og tað var mest sum at rokna sum ein katastrofa fyri føroyska liðið. Ikki bara tí hetta sjálvsagt gjørdi fortreytirnar fyri einum góðum úrsliti verri, men einamest tí málið var so óneyðugt, sum tað á nakran hátt kundi vera.

Atli Danielsen framdi eina deyðssynd, tá hann

## Fakta um dystin

**Føroyar-Kypros 0-3 (0-1)**
*HM-undankappingardystur á Svangaskarði.*
**2.720 áskoðarar**
**0-1:** Michael Constantinou, 39.
**0-2:** Michael Constantinou (br.), 77.
**0-3:** Asimakis S. Krassas
**Dómarbólkur** úr Svøríki.
**Føroyar:** Jens Martin Knudsen - Johan Byrial Hansen (Heðin á Lakjuni, 78.), Óli Johannesen, Jón Rói Jacobsen, Súni Olsen (Mortan úr Hørg, 14.) - Jákup á Borg, Atli Danielsen, Rógvi Jacobsen, Claus Bech Jørgensen - Andrew av Fløtum, Todi Jónsson (Christian Høgni Jacobsen, 46.)
**GK:** Claus Bech Jørgensen, 17., Johan Byrial Hansen, 57., Óli Johannesen, 90.
**Kypros:** Michael Morphis - Georgios Theodotou (Elias Charalasmbous, 80.), Lefteris Eleftheriou, Loukas Louka, Alexndros G. Garpozis (Stelios Okkarides, 62.) - Konstantinos Charalampidis, Konstantinos Makridis, Chrysostomos Michail, Asimakis S. Krassas - Michael Constantinou (Yiasoumis Yiasoumi, 87.), Ioannis Okkas
**GK:** Lefteris Eleftheriou, 25., Konstantionos Makridis, 36., Michael Morphis, 51., Ioannis Okkas, 85.
**RK:** Lefteris Eleftheriou, 45. (2 gul kort)